**Rina er í klæðum frá Diva**

Sólbrillur ......Mari 129,–
Svartur toppur Object 299,–
Bláur toppur ..Diesel 499,–

Jakki ..........Diesel 799,–
Buksur .........Object 799,–
Ringur .........Pilgrim 299,–

Sandalir ........Diesel 399,–
Taska ..........Friis & Co 399,–

**Levi er í klæðum frá Handilskjarnanum:**

Skjúrta .....Kronstadt 599,95,–
Silkislips ..Atlas design 299,95,–
Buksur .....tdk 349,95,–

Belti ........Saddler 299,95,–
Skógvar ....Bianco 675,00,–
*Urið eigur Levi sjálvur*



## Anja í Diva um klæðini:

– Cowboybuksur eru ordiliga in í løtuni. Hesar eru stuttligar, tí tær eru stuttar og summarsligar við nógvum smálutum. Vit fara eisini at síggja nógvar sterkar litir í summar, og toppurin hevur ein sterkan bláan lit.

– Í mótanum beint nú er alt loyvi. Sjálvt um klæðini hjá Rinu eru rokalig og stuttlig, so eru tey eisini feminin, við blondum og einum stórum ringi, og summarslig, við sandalum og stuttum buksum. Tað er loyvt at mixa og seta saman, júst sum tú vilt.

– Jú meiri serligt tað er, jú smartari er tað.

**Mást hava:** Tey flestu eiga sikkurt einar, men øll mugu hava einar cowboybuksir. Skal okkurt nýtt keypast til gomlu buksurnar, má tað verða ein toppur í sterkum liti. Annars fara vit at síggja nógvar glitrandi smúkkur og allar hugsandi taskur.

Diva

## Annika Udbø í Salong Madonna stylaði Rinu og Levi

**Rina:** Hon hevur ótrúliga pena húð, og tí er ikki neyðugt við nógvum, tungum smyrsli. Eingin foundation varð smurd á andlitið. Annika rættaði brýrnar, sum vóru myrkar og penar, og tí ikki vórðu litaðar. Eyguni vórðu smurd við: limegrønum eygnaskugga frá Racine, turkisbláum frá the Body Shop, ljósagráum frá Racine, myrkalillaðum frá Racine. Vippurnar fingu svarta mascara frá Racine. Á kinnabeinini var ein ferskenlitt rouge frá Racine bustað á. Varrarnar gjørdust innbjóðandi við Lancome, juicy lips, við einum veti av reyðum liti í. Hárið á Rinu hevur eitt náttúrligt fall, og varð tí bert leysliga uppsett, við leysum endum, sum hingu niður. Til tað varð Amplifying Volumizing spray frá Matrix nýtt.

**Levi:** Levi hevur klipt sær hjá Anniku fyri ikki so langari tíð síðani, og tí varð hárið bert stylað hesuferð. Matrix amplifyer, fyri at fáa hárið at síggja vátt út. Osmo esessence shaper voks, fyri at fáa frisuruna at halda. Amplifying Volumizing spray frá Matrix.

Salong MADONNA

## Sámal í Handilskjarnarnum um klæðini:

– Í dag er tað loyvt at brúka fínar skjúrtur og slips saman við slitnum cowboybuksum. Tú kanst blanda casual og fínt. Hetta er eitt rættiliga várligt/ summarligt klædnasett.

– Tað eru faktisk eingi sereyðkenni fyri ungdómsmótan í dag. Teir ungu »stjala« skjúrtur og slips frá teimum eldru, meðan teir eldru »stjala« slitnar cowboybuksur frá teimum yngru. Tað er loyvi at blanda ymiskar stílir, júst sum tú sjálvur vilt.

– Mannfólk kunnu loyva sær at tora meira, hvat ið klæðum og litum viðvíkur. Ljósareytt hevur verið in í eina tíð, men limegrønt verður uttan iva tað næsta stóra hittið.

**Mást Hava:** Skalt tú vera við uppá mótan í summar, mást tú hava eina lekra skjúrtu í einum sterkum liti. Hon kann brúkast bæði fínt, saman við einum klædningi, og gerandis, saman við einum slitnum cowboybuksum.

Handilskjarnin